# Høll til sølu

Vísandi til kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2002 um alment útboð av kommunalari fastogn, lýsir Sumbiar Kommuna høllina, sum stendur á havnalagnum í Lopra, til sølu.

Høllin er 1275 fermetrar stór.

Upplýsingar um søluna fáast við at venda sær til Sumbiar Kommunu.

Møgulig tilboð um keyp skulu vera skrivlig og vera Sumbiar Kommunu í hendi í seinasta lagi 5. februar 2003 kl. 18.00.

Kommunustýrið skilar sær rætt til at velja millum innkomnu tilboðini ella havna øllum.

**Sumbiar Kommuna**
FO-970 Sumba
Tlf. +298 370344
Fax +298 370114

---

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Køksassistentar

Tvey størv sum køksassistentar á Landssjúkrahúsinum eru leys at søkja::

- eitt fulltíðar starv til setan 1. mars 2003 ella eftir avtalu
- eitt avloysarastarv frá 16. april 2003 til og við 3. oktober 2003

Køkurin á Landssjúkrahúsinum ger mat til umleið 300 sjúklingar umframt starvsfólkamatstovuna.

**Arbeiðsuppgávur:**
- planlegging og freimleiðsla á deildunum hjá køkinum
- servering og søla í starvsfólkamatstovuni
- uppvask, avrudding og reingerð

**Førleikakrøv:**
- køksassistentútbúgving ella prógv frá líknandi kostfakligari útbúgving
- er positiv/ur og fakliga dugnalig/ur
- góð samstarvsevni og fleksibul
- er ábyrgdafull/ur
- kann arbeiða sjálvstøðugt

**Lønar- og setanarviðurskifti** smb. sáttmálan millum Økonomafelag Føroya og Fíggjarmálaráðið.

Hevur hetta tín áhuga, og tú hevur brúk fyri fleiri upplýsingum, skalt tú venda tær til leiðandi økonomuna, Gudna á Rógvi Joensen, tlf. 00298 313540, lokal 274 - e-postur kokur@ahs.fo

Vit gleða okkum til at hoyra frá tær. Skrivlig umsókn við dokumentatión skal sendast til:

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
100 Tórshavn

**Umsóknarfreistin** er 6. februar 2003. kl. 12.00.

---

TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN

# Skeið í Roknskaparlógini

**31. jan. kl. 15.00-18.00 og 1. febr. kl. 09.00-17.00**

| | |
|---|---|
| **Skeiðið umfatar:** | Gjøgnumgongd av tí **nýggju** roknskaparlógini, ið kom í gildi í Danmark í mai 2001. |
| **Innihald:** | Bygnaðurin í Roknskaparlógini, krøv til ársrokniskapin, virðismetingarreglur, og hvørjir upplýsingar, sum skulu við í ársrokniskapin. |
| **Skeiðleiðari:** | Marianne Mikkelsen og Bent Pedersen |
| **Kostnaður:** | 1.950,00 kr. íroknað tilfar og mat |
| **Tilmelding:** | **áðrenn 23. januar 2003** |

**Skeiðsdepilin við Marknagil**
Marknagilsvegur 77, postsmoga 177, 110 Tórshavn
Tlf. 318813, fax 313374, t-postur dt@hsh.fo

---

# Sløkkiliðsmenn
## til Fuglafjarðar sløkkilið

Fuglafjarðar kommuna søkir hervið eftir 2 leysum sløkkiliðsmonnum til Fuglafjarðar sløkkilið til setan 15. februar 2003 ella skjótast eftir hetta.

Sum treyt verður sett, at viðkomandi skulu hava heilsuváttan og stóra koyrikortið, somuleiðis sum teir antin hava ella skulu taka neyðugt grundskeið í 1. hjálp. Neyðuga víðari útbúgving sambært kunngerð um útbúgving av sløkkiliðsmonnum skipar Fuglafjarðar sløkkilið fyri.

Nærri upplýsingar um størvini eru at fáa frá brunastjóranum Gordon M. Petersen á telefon 220101.

Møguligar umsóknir, ið skulu vera skrivligar, skulu vera Fuglafjarðar kommunu, Norður í Gerði 10B, 530 Fuglafjørður í hendi í seinasta lagi **31. januar 2003 kl. 15.00.**

Kommunan skilar sær rætt til at velja millum innkomnar umsóknir ella onga at taka.

*Fuglafjørður, tann 16. januar 2003*
**Fuglafjarðar kommuna**

---

Veðrið Sosialurin Bilar Lýsingar Tíðindi Viðmerkingar

---

**Í dag eru niðanfyri standandi partafeløg undir tvingsilsavtøku strikað úr partafelagsskránni:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 1067, Sp/f Vest-Tex, 800 Tvøroyri.
**Skrásetingar-nr.** Sp/f 1880, Sp/f D.J. við Heyggj, 970 Sumba.
**Skrásetingar-nr**. Sp/f 2461, Sp/f Faroe Intertrading, 700 Klaksvík.
**Skrásetingar-nr.** Sp/f 2690, Sp/f Dagkeyp, 510 Gøta.
**Skrásetingar-nr.** Sp/f 2722, Sp/f Aldubáran Fishing Co. Ltd. 370 Miðvágur.
**Skrásetingar-nr.** Sp/f 2729, Sp/f Fær-Byg, 826 Trongisvágur.
**Skrásetingar-nr.** Sp/f 2773, Sp/f Gunnleyg Durhuus, 100 Tórshavn.
**Skrásetingar-nr.** Sp/f 2916, Sp/f JPS, 100 Tórshavn.
**Skrásetingar-nr.** Sp/f 3079, Sp/f Vakstrarhúsið, 175 Kirkjubøur.
**Skrásetingar-nr**. Sp/f 3130, Sp/f H. P. Export, 512 Norðagøta.
**Skrásetingar-nr.** Sp/f 3169, Sp/f J. K. Bilar, 188 Hoyvík.

**Í dag eru niðanfyri standandi partafeløg undir trotabúarviðgerð strikað úr partafelagsskránni:**

**Skrásetingar-nr**. Sp/f 650, Sp/f Hvítiklettur, 470 Eiði.
**Skrásetingar-nr.** Sp/f 1045, Sp/f Datronik, 100 Tórshavn.
**Skrásetingar-nr**. Sp/f 2602, Sp/f Ljómbúðin, 420 Hósvík.
**Skrásetingar-nr**. Sp/f 2605, Sp/f Setan, 470 Eiði.
**Skrásetingar-nr.** Sp/f 2709, Sp/f Annfinn Poulsen, 100 Tórshavn.

**Í dag eru niðanfyri standandi feløg í likvidation strikaði úr partafelagskránni:**

**Skrásetingar-nr**. P/F 983, P/F Rudolf Midjord, 927 Akrar.
**Skrásetingar-nr.** Sp/f 1408, Sp/f Poul Áge Joensen, 100 Tórshavn.
**Skrásetingar-nr.** Sp/f 1474, Sp/f Føroya Bjór-Avgreiðslan, 100 Tórshavn.

*Skráseting Føroya, tann 17.01.2003.*

*Kristin Balle*

---

www.sosialurin.fo

---

# FAROE LAW

Bjóðar heimligar og altjóða loysnir

Tosið við Eyðfinn Jacobsen, advokat ella Kára á Rógvi, adv. fulltrúa um tygara tørv

Tinghúsvegur 14,4
P.O.Box 1218
FO-110 Tórshavn
tel 359900 · fax 359901
mob 219902
faroe-law@faroe-law.fo
www.faroe-law.fo

---

**Reparera bilar**
**Tryggingarskaðar**
**Upprætting og lakering**

Alt mekaniskt arbeiði og styling til bilar

**Auto-Tek**
Argjaboðagøta 5 ·
Tlf. 321206 · Fax 321236
eftir kl. 17.00 á Tlf. 221006

---

<ph_1>
<ph_1>



<ph_1>
<ph_1>
<ph_1>

2. hvønn mikudag



**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Sjúkrarøktarfrøðingar

Til **Endoskopeindina**, sum er ein eind undir Skurðgongini í Kirurgiska deplinum, verður søkt eftir sjúkrarøktarfrøðingum til fulltíðar starv, ella á niðursetta tíð, tó innanfyri eina samlaða upphædd svarandi til 1,5 starv. Størvini verða at seta skjótast gjørligt, og setanarbrøkur verður smb. avtalu.

Móttiknir verða ambulantir og innlagdir sjúklingar til kanning og viðgerð. Vaktarskipanin verður røkt av sjúkrarøktarfrøðingunum í Skurðgongini.

Fasta arbeiðstíðin liggur millum klokkan 8.00 og 16.00 vanligar yrkadagar.

Introduktión og upplæring í funktiónini verður tilrættalagt.

Vit søkja eftir sjúkrarøktarfrøðingum við
- prógvi og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- við royndum innanfyri medisinska og kirurgiska sjúkrarøkt
- góðum samstarvsevni og fleksibiliteti
- positivum hugburði og opinleika
- áhuga fyri mennandi avbjóðingum

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Nainu Túgvustein, deildarleiðara á telefon 31 35 40, lokal 138 ella til Ceciliu Vestureið, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 499 L, e-postur ceci@ahs.fo.

Umsóknarfreistin er 10. februar 2003 kl. 12.00.

Er hetta nakað fyri teg, so send eina skivliga umsókn við avriti av prógvum, autorisatión og viðmælum til

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
100 Tórshavn

---




---

# Dagrøktari

Søkt verður eftir dagrøktara at byrja skjótast tilber.

Dagrøktarheimið skal m.a. verða innrættað soleiðis, at børnini hava rúm at spæla í, og at trygt er at spæla uttanfyri.

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag og Føroya Pedagogfelag.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Jónu E. Jacobsen á tlf. 42 16 60.

**Kvívíkar kommuna**
FO-340 Kvívík
Tlf. 42 12 94

---

# Fyrstahjálp

**Grundskeið 12 tímar:**
Hold 1 byrjar 25.01.03 (25/26. jan. + 1. febr.)
Hold 2 byrjar 01.02.03 (1febr. + 9. febr.)

**Víðka skeið 20 tímar**
Byrjar 01.03.03 (1febr. + 8/9. mars)

Um ov lítil tilmelding er, verða skeiðini ikki hildin.

Tilmelding á tlf. 319630, Fax. 311217
Teldupost: redcross@redcross.fo.

**Reyði Krossur Føroya**

---

# Bilur við skaða til sølu!

| | |
|---|---|
| **Merki:** | Honda Civic VTEC 4 hurðar sedan |
| **Árg.:** | 2002 |
| **Km:** | 13.134 |

Bilurin stendur hjá P/F Reyni Service og verður sedur fyri hægsta boð yvir kr. 40.000,- sum hann stendur.



**P/F Reyni Service**
Bilasølan
Tlf. 353040 – lokal 112 og 116